# Nýggja m
# Sosia



*Vágsbotnur í dagsins Tórshavn*

Fríggjadagin í farnu viku flutti Sosialurin av Argjum og inn í hjartað á Havnini. Fyrsti arbeiðsdagur í nýggju hølunum í Vágsbotni var mánadagin.

Starvsfólk og leiðsla á Sosialinum hava leingi glett seg til innflytingardagin, sum varð fluttur aftur nakrar ferðir. Ætlanin var at flyta inn áðrenn páskir, men mongum brestir ætlan. Fríggjadagurin tann 8. apríl gjørdist so endiliga dagurin, har fjølbroytta miðlafyritøkan flutti av Argjum og inn í gamla bygningin hjá Valdemar Lützen í Vágsbotni.

Aftaná næstan 25 ár úti á Argjum er Sosialurin komin inn í býin aftur. Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum, sigur, at hetta er ein nýggja byrjan fyri blað- og miðlahúsið Sosialin.

- Vit á blaðnum fegnast um hesa nýggju og spennandi avbjóðingina og kunnu eisini gleðast um, at vit hava verið so heppin at fáa atgongd til henda bygning og hetta søguliga og sentrala stað, sigur Jan Müller.

Almenn móttøka verður í nýggja miðlahúsinum hjá Sosialinum fríggjadagin tann 15. apríl frá klokkan 15 til 17. Øll eru vælkomin á gátt.

**-hkm**



***Redaktiónin hjá Sosialinum***



***Sosialurin verður umbrotin á teknisku deild***

*Jonhard Hammer, marknaðarleiðari: Vit dáma væl í Vágsbotni, og júst í hesi løtu eru vit ígongd við at dekorera húsið saman við Sansir. Tað skal vera elegant og fella inn í býarmyndina. Annars sær tað út til, at øll hyggja inn á kontórið hjá mær, sum vendir beint út ímóti gøtuni.*